ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Gullið er bíligari í Havn

**Skal metast eftir alment atkomuligum tølum fyri lønarútgjaldingar, so er tað langt ífrá altíð, at gullið kann keypast. Árini 2001 til 2007 var tað bert NSÍ, ið sum meistaralið hevði hægstu lønarútgjaldingarnar tað árið**

| Yvirlit yvir lønarútgjaldingar | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
| ÍF | 102.973 | 164.628 | 86.960 | 466.655 | 611.025 | 717.167 | 862.423 |
| P/F Havnar Fótbóltur *) | 601.892 | 689.860 | 658.050 | 640.552 | 548.000 | 872.818 | 1.350.350 |
| SP/F KÍ **) | 372.796 | 831.160 | 1.381.786 | 1.489.743 | 1.071.000 | 1.016.685 | 944.210 |
| EB/Streymur | 56.296 | 242.069 | 257.050 | 314.735 | 554.560 | 749.400 | 914.433 |
| B 36 | 464.010 | 504.751 | 386.000 | 403.500 | 887.620 | 1.233.167 | 1.033.500 |
| NSÍ | 679.764 | 1.302.413 | 1.177.654 | 1.066.091 | 896.246 | 1.000.488 | 1.467.380 |
| GÍ | 594.933 | 1.627.507 | 859.375 | 583.050 | 878.150 | 973.978 | 963.800 |
| B 71 | 262.120 | 180.508 | 138.395 | 206.100 | 274.445 | 319.100 | 447.800 |
| B 68 | 939.940 | 1.635.008 | 1.385.596 | 1.319.100 | 1.103.800 | 1.469.283 | 1.288.512 |
| Skála | 73.818 | 241.750 | 471.380 | 726.559 | 804.969 | 746.735 | 794.000 |
| Meistari | B36 | HB | HB | HB | B36 | HB | NSÍ |
| Eru bert tølini fyri felagið, sum rekur besta mansliðið hjá HB. | | | | | | | |
| Inniheldur tølini fyri KÍ (2001-2005), Sp/f KÍ Fyriskipan (2005) og Sp/f KÍ (2006-2007) | | | | | | | |

*Talvan sýnir yvirlitið frá TAKS fyri lønarútgjaldingar í 2001 til 2007 hjá teimum 10 feløgunum, sum í fjør vóru í Formula-deildini*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur verið sagt upp til fleiri ferðir. Føroyameistari verður tað felagið, ið spílar seg mest út fíggjarliga, og sum í størstan mun keypir spælarar úr øðrum feløgum til hópin.

Skal metast eftir lønaryvirlitinum her á síðuni, so er hetta tó langt ífrá allur sannleikin.

Talvan og tilhoyrandi strikumyndir vísa, hvussu nógv einstøku feløgini, sum í fjør vóru í Formula-deildini, hava goldið í løn árini frá 2001 til 2007.

Og her sæst, at einasta ferðin, at meistaraliðið hevur goldið flestu krónurnar í løn, var í 2007, tá NSÍ gjørdist meistari.

Hini árini frá 2001 til 2006 vunnu HB og B36 FM-heitið, men tað var tó hampuliga langt ífrá, at hesi feløg tá vóru tey, sum nýttu størstu upphæddirnar til lønir.

## Bíligari í Havn

At Havnarfeløgini liggja í lægra endanum tey árini, sum tey hava vunnið FM, stavar partvíst eisini frá, at hesi ofta sleppa bíligari enn kappingarneytarnir á bygd.

Landafrøðiliga og demografiska býtið av Føroyum er nú einaferð soleiðis, at flestu fólkini, flestu útbúgvingar- og flestu starvstilboðini eru í høvuðsstaðnum, og tí er hetta í sjálvum sær nakað, sum dregur spælarar móti høvuðsstaðarfeløgunum. Tí kunnu havnarfeløgini ofta fáa spælarar, hóast tey bjóða minni samsýningar enn kappingarneytarnir á bygd, og hartil er virðið av til dømis fríari íbúð í Havn alt annað líka størri, enn tað er á bygd.

## Sýnir ikki alt

Tað skal tó havast í huga, at yvirlitið her á síðuni ikki sýnir alt. Frír ágóðar eru vanliga eisini nakað av tí, sum feløg veita spælarum sínum. Hesir eru ikki við í yvirlitinum, sum bert sýnir tað, ið er útgoldið umvegis A-skattaskipanina.

Og so er væl eingin loyna, at tað í føroyskum fótbólti eisini eru pengar av meira gráa og svarta slagnum. Hvussu stórar hesar upphæddir eru, er ilt at meta um, og hesar framganga neyvan í einstøku roknskapunum hjá feløgunum.




























